# Vinnumálaráðharrin: Alarar og bankar hava medábyrgd av kreppuni



**Bjarni Djurholm meinar at alivinnan og fíggjandi peningarstovnar eiga líka nógv at taka ábyrgd av egnum prioriteringum sum at útpeika politikarar sum Svarta Per**

ALIVINNA
*Búi Tyril*

Alivinnan hevur havt leysar teymar og alarar hava av egnum fríum fyritaksemi sett út laks; samstundis hava peningastovnar og aðrir kreditveitarar verið fult vitandi um villkorini í vinnuni og sum heild hevur eingin ikki viljað havt politiska uppíblanding. Tí er tað skeivt, nú ið hart leikar á, at renna undan egnari ábyrgd og kasta skuldina fyri skilið yvir á onnur.

Hetta sigur okkara virkandi vinnumálaráðharri, Bjarni Djurholm, í viðmerking til úttalilsini hjá stjóranum í Føroya Banka, Jørn Astrup-Hansen, sum stóðu at lesa í Sosialinum týsdagin.

– Eg noteraði mær at hetta kom júst valdagin, segði Bjarni Djurholm, og duldi ikki fyri eitt sindur av skepsis.

– Tað tykist løgið at bankastjórin stendur fram beint nú sjálvan valdagin, helt Bjarn Djurholm fyri.

– Maðurin hevur jú rætt í nógvum av tí hann sigur sum so; hann sigur tó so ikki nógv um hvørja ábyrgd hann sjálvur hevur í hesum. Bankin hevur jú kent til fortreytirnar men hevur kortini valt at taka váða og fíggjarliga ábyrgd; hann hevur enntá havt egnan fiskadjóralækna knýttan at alivinnuni og má hava verið rættiliga væl vitandi um viðurskiftini. Eg haldi at hvørki hann ella onnur eiga at koma nú sum ketta burtur úr høvdatrog og geva politikarunum alla skuldina fyri kreppuna.

### Konsolidering

Spurdur um hann ikki sjálvur sum vinnumálaráðharri metir seg at eiga lut í ábyrgdini av kreppuni í alivinnuni, svarar Bjarni Djurholm játtandi, men leggur samstundis dent á at talan er um fleiri partar og at allir eiga sín part av hesari ábyrgd.

– Politikarar og embætisfólk eiga sín lut í ábyrgdini av øllum sum hevur við karmarnar at gera, lógarverk og veteriner viðurskifti íroknað eftirlit og umsiting… Vit áttu kanska at strammað í fyri tveimum árum men sum eg ivist stórliga í um tað yvirhøvur var politiskt møguligt tá. Tiltøkini høvdu nevniliga verið drastisk, og høvdu inniborið slakt av so at siga øllum laksinum. Eg haldi ikki tað var realistiskt at fáa tílík tiltøk ígjøgnum.

– Hetta málið er ikki so einfalt ella svart og hvítt sum tað nú verður gjørt til. Í veruleikanum hava fortreytirnar verið givnar og allir partar hava átt sin leiklut. Tað sum hevur verið framt politiskt hevur verið gjørt í samráð við vinnuna, peningastovnar, tann veterinera myndugleikan og lógarkøn fólk; allir partar eru impliceraðir og eiga tí eisini sína ábyrgd.

Meðan vinnumálaráðharrin harmast um støðuna í alivinnuni sigur hann seg samstundis hava góðar vónir um framtíðina.

– Tað sum er hent er ein sorgarleikur, staðfesti Bjarni Djurholm.

– Støðan er grátilig men potentialið í vinnuni er stórt og eg ivist ikki í at alivinnan fer at fóta sær aftur. Men vit koma at síggja eina konsolidering í næstum og eigararnir verða færri og størri. ILA sjúkan er í veruleikanum um at verða bast og VESO-verkætlanin hjá Havbúnaðarfelagnum hjálpti í arbeiðinum at seta røtt tiltøk í verk ímóti sjúkuni.

### Ja til pant og íløgur

Hvat annars viðvíkur spurningum um pant í aliloyvum, útlendskan kapital og almennan stuðul, er Bjarni Djurholm rættiliga greiður.

– Í einari frágreiðing viðvíkjandi umsiting av aliloyvum sum varð skrivað av umboðum fyri vinnuna, fíggjarstovnar og Vinnumálaráðið og latin okkum í november, varð mælt til nakað sum mótsvaraði at pant skuldi kunna takast í aliloyvum; ætlanin var eisini at sami bólkur skuldi skriva eina frágreiðing um kapitalviðurskiftini við atliti til útlendskar íløgur…

– Persónliga haldi eg ikki at vit kunnu bjóða útlendingum at seta pening í vinnuna við avmarkingum í eigaraskapinum so sum lógin sigur í løtuni; skulu vit hava avmarkingar so eiga hesar at liggja í sjálvum treytunum fyri aliloyvini.

– Eg meini ikki at peningaligur stuðul til vinnuna eigur at verða latin. Hinvegin er tað tungt hjá vinnuni at gjalda fyri alt eftirlitið sum hon sambært galdandi krøv noyðist ígjøgnum; her havi eg biðið um at fingið sett av tríggjar milliónir krónur um árið tey komandi fýra árini fyri at lata landskassan gjalda fyri tann tøkniliga og veterinera partin av einari koppseting í alivinnuni. Ætlanin er so at vinnan sjálv rindar fyri koppingarevni og tað kemur væntandi at kosta 25 oyru per smolt. Síðani hava vit játtað tvær milliónir krónur til Heilsufrøðiligau Starvsstovuna so hon útvegar sær neyðug tól í sambandi við koppsetingar arbeiðið.

# Jørgen hálaði inn í Vágum

**Sambandsflokkurin var langt frá tveimum valdømisvaldum í Vágoynni, og Jørgen Niclasen fekk eitt rimmarval. Sambandsflokkurin er kortini størst**

LØGTINGSVAL
*Heri á Rógvi*
*heri@sosialurin.fo*

Jørgen Niclasen feldi fyri einum ári síðani tár fyri opnum skíggja í løgtinginum. Men týsdagin vóru tárini - um nakað - gleðistár. Ùrslitið gjørdist 318 persónligar atkvøður. Hetta eru 59 atkvøður fleiri enn við seinasta val. Fòlkaflokkurin stillaði bert trý valevni upp í Vágum, og tað var tískil rúmligt hjá teimum trimum valevnunum. Samlaða úrtøkan hjá Fólkaflokkinum gjørdist 532 atkvøður, og hetta er ein framgongd áljóðandi trý prosent.

Javnaðarflokkurin hevði eina lítlan framgongd í Vágum, men flokkurin var langt frá at røkka einum valdømisvaldum.

### Marjus suverenur

Sambandsflokkurin lá í einari veljarakanning til at fáa tveir valdømisvaldar tingmenn í Vágoynni, men tað var langt frá tí týsdagin. À listanum hjá Sambandsflokkinum var tað Marjus Dam, ið gjørdist tryggur á fyrsta plássinum. Hann fær nógv flestar atkvøður hjá flokkinum í Vágoynni, men fekk kortini persónliga 37 atkvøður færri hesaferð í mun til valið í 2002.

-



# Rockhetjur úr 70'unum til Føroya at hava konsert



*Jethro Tull er rockbólkur úr Bretlandi, sum hevði sína stóru tíð í sjeytiárunum. Vørumerkið hjá bólkinum var tvørfloytan hjá sangaranum Ian Anderson*

**Listastevna Føroya hevur biðið rockbólkin Jethro Tull koma til Føroya at hava konsert. Í næsta mánaði fara umboð fyri Listastevnuna til London fyri at hitta bólkin og fáa seinastu snøklarnar í endaligu avtaluni upp á pláss**

TÓNLEIKUR
*Eyðun Klakstein*

Gongur alt sum ætlað, kemur kendi bretski rockbólkurin Jethro Tull til Føroya at hava konsert í august mánaði.

Á heimasíðuni hjá bólkinum verður longu boðað frá, at teir ætla sær til Føroya at hava konsert í summar.

Tað er Listastevna Føroya, sum hevur arbeitt við at fáa Jethro Tull til Føroya at spæla, og har verður nú váttað, hvør ætlanin er.

– Jethro Tull skal hava konsert á Listastevnuni. Teir skulu spæla í Norðurlandahúsinum mikudagin 11. august, sigur Oddvá Nattestad, samskipari.

### Gera endaliga avtalu

Síðst í februar mánaði fara hon og Óla Jákup í Dímun, ljóðteknikkari, til London at gera endaliga avtalu við bólkin og fáa teir tøkniligu spurningarnar upp á pláss. Eisini skulu tey kunnu um umstøðurnar í Føroyum.

Jethro Tull gav sína fyrstu plátu út í 1968, og gjøgnum 1970'ini vóru teir millum stóru rocknøvnini. Teir spældu øðrvísi rocktónleik, sum tordi at blanda fleiri stílir saman, og so var tvørfloytan hjá høvuðsmanninum í bólkinum, Ian Anderson, eitt vørumerki hjá teimum.

Til konsertina í Norðurlandahúsinum er ætlanin, at gólvið skal slætt, og opið verður út í Klingruna, so at sum mest av fólki kann verða inni í salinum.

# Tónleikarar funnu ikki rætta lagið

**Eingin av teimum kendu tónleikarunum, sum stillaðu upp til løgtingsvalið, vórðu valdir inn, men maðurin, sum mælti til at geva tónleikinum c-vitaminir, kom strúkandi inn á ting**

TÓNAR Á TINGI
*Eyðun Klakstein*



*Jón Tyril var ein av kendu tónleikarunum, sum stillaðu upp á løgtingsvalinum, men hvørki hann ella hinir tónleikararnir komu í nánd av nøkrum løgtingssessi*

Jón Tyril, Rani Nolsøe, Terji Rasmussen og Niels Uni Dam eru kendir sum profilar í føroyskum tónleikalívi. Teir eru kendir úr tónleikabólkum sum Clickhaze, Frændur, Føstufressar og MC Hár og hava allir verið nógv frammi seinastu árini.

Týsdagin bjóðaðu teir av í politikki, men eingin teirra stóð seg serliga væl.

Tann, sum fekk frægastu persónligu undirtøkuna, var Jón Tyril, ið var nummar 6 á Tjóðveldislistanum í Eysturoynni við 55 atkvøðum.

Hann hevði tó ongan kjans ímóti teimum meira garvaðu monnunum í flokkum – Torbjørn Jacobsen og Hans Tausen Olsen.

### Ikki í nánd av sessi

Rani Nolsøe er kommunupolitikari í Klaksvík, og hesaferð royndi hann seg til løgtingsvalið. Hann gjørdist nummar 4 á Tjóðveldislistanum í Norðoyggjum við 42 atkvøðum, og heldur ikki hann kundi gera nakað við teir meira royndu politikararnar, Karsten Hansen og Heina O. Heinesen, sum fingu nógv fleiri atkvøður.

Terji Rasmussen stillaði upp fyri Sjálvstýrisflokkin í Suðurstreymoy, og hann fekk 29 atkvøður og gjørdist nummar 5 á listanum. Sjálvstýrisflokkurin fekk bert ein tingmann, og hann kom í Eysturoynni

Niels Uni Dam endaði sum nummar 9 á Tjóðveldislistanum í Suðurstreymoy við 29 atkvøðum. Í Suðurstreymoy fekk Tjóðveldisflokkurin tríggjar tingmenn, men Niels Uni kom ikki upp á tal til teir sessirnar.

### C-vitaminir munaðu

Ein annar maður, sum gjørdi vart við seg í kjakinum um umstøðurnar hjá tónleikinum, hevði eitt óført val.

John Johannessen, sum er kendur sum tíðindamaður í Sjónvarpinum, mælti til at geva føroyskum tónleiki c-vitaminir, og hóast virðislønt skald helt lítið um boðskapin hjá honum, kom John syngjandi á ting við 380 persónligum atkvøðum. Merkistvert var tað, at hann var frammanfyri royndar politikarar sum Helenu Dam á Neystabø, Katrin Dahl Jacobsen og Elin Lindenskov.

Johan í Kollafirði hevur verið skemtiligt íkast til valið hesaferð, men hann er eisini tónleikari, og skal tosast um tónleikaliga kapping, so var Johan í Kollafirði vinnarin, tí hann fekk 340 persónligar atkvøður í Suðurstreymoy.